# Høgni eigur ovastu rók

**Aftur hesa vikuna eigur Høgni Lisberg best dámda lagið í Føroyum, sambært hittlistanum yvir nýggj løg hjá Kringvarpinum**

TÓNLEIKUR
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Í løtuni ger lagið Morning Dew hjá Høgna um seg í íslendskum útvarpi, men eisini her heima klárar Høgni Lisberg seg væl. Aftur hesa vikuna liggur Høgni ovast á 15 teimum bestu við lagnum Just Dig,

Høgni er í løtuni í Íslandi, har hann spælir nakrar konsertir komandi dagarnar. Leygarkvøldið fer hann á pallin í NASA saman við m.ø. Makrel, ið eisini eru at hoyra í íslendskum útvarpi. Tað er lagið Filthy Tongue, ið íslendingar hava tikið til sín. Men eisini á 15 teimum bestu klárar filthy Tongue seg væl, hesa vikuna er lagið á einum sætta plássi.

Hini trý føroysku løgini á 15 teimum bestu hesa vikuna eru Droymi Mitt Um Dagin hjá Poppkorn, Backyard Traffic hjá Róki og Fremmandur hjá Peturi Pólsyni á 12., 13. og 14. plássi.

**15 tær bestu**

| | |
|---|---|
| 1 | Høgni Lisberg - Just Dig |
| 2 | Black Eyed Peas - Pump it |
| 3 | Kelly Clarkson - Because Of You |
| 4 | Pink - Stupid Girls |
| 5 | The Pussycat Dolls - Beep |
| 6 | Makrel - Filthy Tongue |
| 7 | Madonna - Sorry |
| 8 | Red Hot Chili Peppers - Dani California |
| 9 | Kent - Dom som försvann |
| 10 | Wyclef Jean & Shakira - Hips Don't Lie |
| 11 | Bobby Sinclair - Love Generation |
| 12 | Poppkorn - Droymi Mitt Um Dagin |
| 13 | Rókur - Backyard Traffic |
| 14 | Petur Pólsson - Fremmandur |
| 15 | Joey Moe - My Last Serenade |

**Eykaløg**

Gavin Degraw - Just Friends
Rihanna - S.O.S. (Rescue Me)
The Rasmus - Sail Away
Ne-Yo - So Sick
Fort Minor ft. Holly Brock - Where'd You Go

# Varpa ljós á Jakob Jakobsen í Hetlandi

Conference on "the great Jakobsen".

Tað er yvirskriftin í tíðindaskrivinum, sum vit hava fingið um ráðstevnuna í Hetlandi, har arbeiði hjá málvísindamanninum, Dr. Jakobsen, verður umrøtt av fólki úr ymiskum londum.

Ráðstevnan, sum verður hildin í NAFC Marine Centre í Scalloway, er fyriskipað av hetlendska skjalavørðinum, Brian Smith, Eileen Brooke-Freemann (Shetland Amenty Trust) og Turið Sigurðardóttir, sum starvast á Fróðskaparsetri Føroya.

Tað var tíðliga í 1890-unum, at Dr. Jakobsen fór til Hetlands at savna orð og staðarnøvn. Hann arbeiddi við tilfarinum, sum hann savnaði, til hann doyði ungur undir seinna heimsbardaga.

Einir fimtan røðarar úr fleiri ymiskum londum fara á ráðstevnuni at tosa um íkastið, sum Dr. Jakobsen hevur givið hetlendsku og føroysku mentanini, og millum røðararnar verða eisini føroyingar, eitt nú Marianna Debes Dahl, Hjalmar Petersen og Eyðun Andreassen.

Jakob Jakobsen livdi í árunum, 1864-1918.

**-vilmund**

Miðlahúsið í Vágsbotni :

## "Er land fyri frið politikkurin loysnin á stríðnum millum palestinar og ísraelsmenn?"

Leygardagin 22. apríl kl. 15 heldur Marner av Lofti, integratiónspedagogur fyrilestur í Miðlahúsinum um evnið:

Marner av Lofti er 37 ára gamal og uppvaksin í Havn.

Í 1992 fór hann Ålborg og tók pedagogprógv fra Skipper Clement kollegiinum.

Hann arbeiðir í løtuni í fólkaskúlanum í Ålborg við børnum av útlendskum uppruna.

Marner er eisini tónleikari og sangari og hevur sjálvur skrivað løg.

Hann fer eisini at spæla klaver og syngja sangir, ið hava samband við Ísrael.

Í fyrilestri sínum fer Marner m.a. at greiða frá landfrøðligu viðurskiftunum í Miðeystri síðani fyrra heimsbardaga til dagin. Gjógvin millum palestinar og ísraelsfólk og arabiska heimin er so djúp, at ilt er at fáa eyga á nakra loysn. Ella er nøkur loysn? Og hvør er loysnin.

## Føroyameistarakapping í billard

TÍÐINDASKRIV

Fríggjadagin og leygardagin verður føroyameistarakapping í billard fyri einstakligar í Havn. Teir níggju spælararnir, sum hava kvalifiserað seg til kappingina, eru: Hendrik Petersen, Bjarni Skaalum, Krisjan Suni Høgnesen, Sonhard Johannessen, Jan Müller, Carsten Hansen, Niels Nielsen, Njál Petersen og Jógvan Jørgensen. Spælt verður á borðunum í Havnar Klubba og Kagganum. Føroyameistarin tvey tey seinastu árini, Hendrik Petersen er favorittur at vinna aftur í ár, men hann fer at fáa harða kapping, ikki minst frá Bjarna Skaalum og Krisjan Suna Høgnesen.

Leiga hølini hjá Gourmet kl. 8-17 til frokost, fundir, móttøkur, o.a...

Nú hava vit opið mánadag kl. 18-22

Tað er nú stongt á døgurða

Føroyskar rávørur.
Vit sóknast eftir góðum føroyskum rávørum, so sum grønmeti, urtum, krabba, hummara, ost, etc.....

Kokkanæmingur.
Okkum tørvar ein góðan kokkanæming at byrja sum skjótast. Tú fært Føroya besta og mest krevjandi læruplás.



Gourmet v/Leif Sørensen

GR. KAMBANSGØTA 13 · TÓRSHAVN · TEL 322525 - 217575